*Tað er ikki lætt hjá einum unglingi at vinna sær fast pláss hjá meistarunum. Men Øssur Dalbúð fer við góðum treysti undir uppgávuna*



# Portrið er trongt hjá teimum ungu

**Øssur Dalbúð arbeiðir nógv, meðan hann bíðar eftir møguleikanum í NSÍ, sum hann vónar at fáa høvi at skifta út við felag uttanlands**

Unglingaliðið hjá NSÍ vann bæði FM og steypakapping í fjør. Árgangirnir eru framúr evnaríkir, og nógvir unglingar vóru við til at manna hópin á besta liðnum: Jóhan Troest Davidsen, Einar Hansen og Bogi Løkin vóru fastir menn. Øssur Dalbúð, sum fyrstu ferð varð innskiftur á besta liðið í Vági í fyrraárið, spældi í løtum í 24 av 27 landskappingardystum, og Jann Martin Mortensen og Klæmint A. Olsen vóru eisini við.

Bogi, Jóhan og Einar eru nú ov gamlir til unglingaliðið, men kortini er NSÍ aftur í ár gott boð upp á unglinga FM.

Tað er tó í bestu deildini, teir ungu vilja sleppa framat. Eftir at NSÍ hevur keypt stórt inn niðri á Balkan, er tað ikki vorðið lættari. Millum NSÍ viðhaldsfólkini verður prátað um, at útlendingarnir skulu spæla seg av, meðan teir ungu royna at spæla seg á liðið:

- Í vetur varð eg kontaktaður av onkrum øðrum feløgum, men eg eri sinnaður at stríðast fyri at spæla við NSÍ. Eg sat nógv á beinkinum í fjør, tá ið eg eisini spældi við unglingaliðnum og 1. deild. Eg royni at hugsa positivt, men sjálvandi vil eg sleppa framat á besta liðnum. Tað verður ikki nóg stór menning, um eg bara sleppi at spæla tíggju minuttir hvørja ferð, sigur evanríki Øssur Dalbúð, sum nú leygardagin, 28. mars, verður 19 ár.

Um hann sleppur upp í part í NSÍ álopinum, so ætlar hann sær at spæla hetta kappingarárið við barndómsfelagnum. Um hann ikki sleppur framat, so vónar hann longu í summar at fáa høvið at royna fótbóltsevnini uttanlands:

- Eg var á fótbóltsskúla í Oure, tá ið eg gekk í 10. flokki. Fleiri av teimum, sum eg gekk í skúla saman við, royna nú at arbeiða seg upp á besta liðið í divisiónsfeløgum. Eg veit um ein í SønderjyskE, ein í OB og ein í Brøndby.

Øssur arbeiðir miðvíst fyri at gerast betri fótbóltsspælari. Hann er góður við bóltinum, reikar nógv, og tá ið hann fær møguleikan framman fyri mótstøðumálið er hann kaldur.

- Tá ið kappingin var liðug í heyst, hildu vit frí í nakrar vikur. Vit hittust ikki aftur til venjingar fyrrenn í januar, men vit høvdu møguleika at styrkisvenja í kappróðrarneystinum, og tað hava fleiri av ungu spælarunum gjørt, sigur Øssur, sum heldur venjingarnar hjá Jóhan Nielsen vera sera góðar.

Umframt at vera NSÍari hevur Øssur altíð verið íðin Arsenal fjeppari. Stóru fyrimyndirnar í barnaárunum vóru Ian Wright og Dennis Bergkamp. Nú heldur hann, at Arsenal, tá ið teir eru upp á sítt besta, spæla flottari fótbólt enn nakað annað lið.

- Teir eru fantastiskir við bóltinum, teir eru skjótir, og teir hava framúr fatan av, hvussu fóltsspælið kann útinnast, og at tað hevur týdning bæði at hava liðspælarar og individualistar, sum kunnu skapa tað óvæntaða. At sleppa til sovorðið felag verður hjá teimum flestu ein dreymur. Jóhan Troest Davidsen hevur roynt seg í Everton, og í løtuni er Karl Løkin í Randers FC. Frá teimum havi eg hoyrt um lívið sum yrkisspælari, og í fyrstu atløgu hevði eg verið væl nøgdur, um eg fekk høvi at royna meg í Danmark.

Øssur Dalbúð spældi í eitt ár á U15 landsliðnum. Tvey tey seinastu árini hevur hann verið á U19 landsliðnum, sum hann nú er ov gamalur til. Merkisvert er tað, at hann ongantíð fekk høvi at royna seg á U17 landsliðnum. Nú arbeiðir Øssur fyri at sleppa upp í part á U21 landsliðnum:

- Formuladeildin og serliga landsliðini eru vindeyguni, har útlendingar hyggja fyri at finna fram til føroyskar spælarar, sum teir møguliga kunnu brúka, og tá ið eg droymi um at sleppa av landinum, so sigur tað seg sjálvt, at eg vil sleppa at spæla við Formula liðnum og landsliðnum, sigur Øssur Dalbúð.

Men portrið er trongt. Bæði inn á NSÍ liðið og U21 landsliðið.

----------------------------------------

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

## Metingin

**Tað er altíð truplari at verja meistaraheitið, heldur enn at vinna tað, verður sagt. Fáur man tó ivast í, at NSÍ hevur kvalitetirnar, sum skulu til, um hetta skal eydnast. Spurningurin er, hvørja ávirkan tað fær, at Jens Martin Knudsen ikki longur er á liðnum. Og um nýggju útlendingarnir fella nóg væl og skjótt inn á liðið.**

FUJITSU COMPUTERS SIEMENS
formula.fo